# 15 ár síðani skipamálini endaðu

**Í gjár, 5. desember, vóru 15 ár, síðani Føroya Rættur fríkendi teir, sum vóru ákærdir í málinum um svartkjaftatrolaran Skálafjall, sum skálamenn áttu. Harvið endaðu tey nógv umrøddu skipamálini**




Rættarmálið um Skálafjall var tað seinna av tveimum. Tað fyrra var um byggimálið við svartkjaftatrolaranum Heygadrangi hjá vestmenningum. Tað málið endaði við fríðøming í 1993.

Málið um Skálafjall dró út, og dómur fall ikki fyrr enn tann 5. desember í 1995. Avgerðin hjá rættinum var tann sama sum í tí fyrra málinum, og allir teir ákærdu blivu fríkendir fyri svik ímóti landsstýrinum og danska skipakreditgrunninum. Tað einasta, sum nú kundi halda lív í skipamálunum, var, at ríkisadvokaturin skeyt dómin inn fyri landsrættin. Men tað vildi hann ikki.

Eitt ár frammanundan hevði politiið lagt hald á skjøl frá fleiri øðrum skipamálum við einari sera umfatandi húsarannsókn, men fríkenningin í málinum um Skálafjall gjørdi, at øll málini blivu slept.

Fyrri trimum vikum síðani kom bókin "Góðan morgun - tað er politiið", sum viðger júst hetta evnið. Tað er Árni Joensen, sum hevur skrivað bókina.

9

Jólagávan til hennara

So nýtist tær ikki at bíða til seinastu løtu




DEMMUS

Telefon 31 15 15

Jóladøgverðatilboð frá Føroya Keypssamtøku um alt landið

Íslendskar rullupylsur



Fyri kilo 49⁹⁵

Nakkasteikir – kjøtugar uml. 2,8 kg



Fyri hvørja 129⁹⁵

Íslendsk lambskrov – nýflett



Fyri kilo 49⁹⁵

Íslendskir lambsbøgir – strektir, 1,2-1,4 kg



Fyri hvønn 69⁹⁵

Turrur fiskur – íslendskur



400 g fyri 159⁹⁵

Lambstjøgv – nýsælendsk uml. 1,8 kg



Fyri hvørt 119⁹⁵

Cherry Valley dunnur 3200 g



Fyri hvørja 129⁹⁵

Um alt landið!

fk